# Nógv uppskot um at fáa Suðuroynna á føtur aftur

**Samgongan arbeiðir við nógvum uppskotum um at fáa Suðuroynna á føtur aftur**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í løtuni arbeiðir samgongan við eini ætlan fyri, hvussu Suðuroyggin kann fáast á føtur aftur.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at samgongan arbeiddi við málinum í alla síðstu viku og hildið verður fram í hesi vikuni.

Men hann sigur, at ætlanin er at arbeiða skjótt.

Løgmaður sigur, at tað verður arbeitt við nógvum ymsum møguleikum.

Men hann sigur, at so leingi málið er í politiskari viðgerð, vil hann ikki í smálutum koma inn á teir møguleikar, sum eru.

Men tað hevur verið nevnt, at øktur flutningsstuðul, beinleiðis flutningssamband ímillum Føroyar og Skotland og ein suðuroyargrunnur, sum skal seta vágafúsan pening í vinnuligar ætlanir í Suðuroynni, eru nøkur av uppskotunum.

– Vit hava øll uppskot til viðgerðar, eisini tey, sum eru nevnd frammanfyri, sigur hann.

Hvat úrslitið verður, veldst so um, hvørja semju, tað ber til at fáa í samgonguni.

Men Løgmaður staðfestir, at tað er stórur politiskur vilji til at loysa trupulleikan.

Hann sigur, at landsstýrið arbeiðir bæði við at loysa teir bráðkomnu arbeiðsloysistrupulleikar sum eru, men hugt verður eisini at uppskotum, sum kunnu menna oynna í longdini.

Í tí sambandi hevur verið nevnt, at almennir stovnar eiga at verða fluttir til Suðuroyar.

Hann sigur, at landið ætlar at taka stig á teimum økjum, sum landið hevur við at gera, og tað er at skapa karmar.



*–Vit arbeiða við nógvum møguleikum og vit ætla at arbeiða skjótt, sigur løgmaður*

### Kommunur eiga at leggja kommunur saman

Hinvegin heldur hann eisini, at kommunurnar í oynni eiga at taka tey stig, sum tær kunnu taka.

Og hann dylir ikki fyri, at hann heldur, at øll oyggin átti at verið løgd í eina kommunu.

– Tað hevði verið ein veldugur fyrimunur, at suðuroyingar kundu drigið eina línu og staðið saman ímóti kappingini við meginøkið. Í løtuni er tað Vágur tað snýr seg um ein dagin, Tvøroyri dagin eftir og síðani Hvalba og er als ikki til frama fyri oynna, sigur Løgmaður.

Hann sigur, at verður øll oyggin ein kommuna, kundi tað eisini skapt møguleikar fyri at sett størv á stovn í oynni við fólki við útbúgving.

Eitt nú hevði ein stórkommuna í Suðuroy havt brúk fyri verkfrøðingum og øðrum teknikarum, løgfrøðingum, grannskoðarum og búskaparfrøðingum o.s.fr.

– Hetta eru alt tænastur, sum suðuroyingar í løtuni keypa úr Havn, men tað vildi verið eitt framstig at fingið hesi arbeiðsplássini í oynna.

Annars heldur løgmaður framvegis, at tað er eitt sera skilagott uppskot at byggja heilsuskúla og miðnámsskúla í ein depil í Hovi og at byggja eitt røktarheim í Vági, tí tað hevði skapt nógv arbeiði í byggivinnuni og hevði skapt varandi, almenn arbeiðspláss, sum tað er harðliga brúk fyri.

# Nýggi Smyril í fasta sigling ímillum Suðuroy og Skotland

**Eitt uppskot, sum landsstýrið arbeiðir við í royndunum at loysa rupulleikan hjá Suðuroynni, er at lata Smyril sigla ímillum Suðuroynna og Skotland einaferð um vikuna**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skjótt verður kanska aftur beinleiðis sigling við farmi og ferðafólki ímillum Føroyar og Skotland*

Nú fer tað almenna kanska aftur undir beinleiðis ferðasamband ímillum Suðuroynna og Skotland.

Í øllum førum umhugsar landsstýrið í hesum døgum at seta nýggja Smyril í fasta rutusigling ímillum Suðuroy og Skotland, eina ferð um vikuna.

Tað er í sambandið við royndirnar at finna eina loysn á trupulleikunum hjá Suðuroynni, at hesin møguleikin verður umhugsaður.

Tað hevur Sosialurin fingið at vita frá keldum í samgonguni.

Tað, sum arbeitt verður við, er at lata nýggja Smyril sigla ímillum Føroyar og Skotland um vikuskiftini.

Ætlanin er, at nýggi Smyril sigla úr Havnini til Suðuroynna sum vant fríggjakvøld.

Fríggjakvøld skal hann so fara víðari úr Suðuroy til Skotlands við farmi og ferðafólki.

Hann verður so aftur á Tvøroyri seinnapartin sunnudagin og kann síðani sigla aftur ímillum Suðuroy og Havnina sunnukvøld, sum hann plagar.

Ímeðan hann er burtur, skal so Smyril, sum vit nú hava, røkja suðuroyarsiglingina leygardagar og sunnumorgun.

Tað verður júst mett at vera ein høvuðstrupulleiki hjá fiskivinnuni í Suðuroy, at tað er so vánaligt flutningssamband ímillum Suðuroynna og Skotland.

Suðuroyingar høvdu fast samband við treylaraflutningin ímillum Suðuroynna og Skotland fríggjadag, men mitt í nítíárunum varð Teistin seldur og so datt tað sambandið niðurfyri og tað varð mett sum eitt stórt bakkast fyri fiskivinnuna í Suðuroy sum fyri ein stóran part livdi av at selja feks fløk.

Og tað eru eisini tingmenn úr samgonguni, sum hava borið tað uppá mál av tingsins røðarapalli at lata nýggja Smyril sigla eina ferð um vikuna ímillum Suðuroy og Skotland.

Samgongan arbeiðir í hesum døgum við eini ætlan fyri, hvussu Suðuroyggin kann fáast á føtur aftur.

Hann vil ikki gera viðmerkingar til smálutir í hesari bjargingarætlanini, men hann sigur, at arbeitt verður nógvum ymsum møguleikum.

Og hann váttar, at hetta er ein møguleiki av teimum mongu, sum arbeitt verður við.

Stjórin á Strandferðluni hevur ongar viðmerkingar.

# Løgmaður mátti sita heima

**Tá ið nýggja, stórfingna operahúsið í Keypmannahavn varð tikið í nýtslu leygardagin, var eisini løgmaður boðin við, men hann mátti geva avboð**

AVBOÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið var nýggja, stásiliga operahúsið í Keypmannahavn, tikið í nýtslu.

Har vóru eisini umboð fyri almennu Føroyar boðin við. Eitt nú var skuldu løgmanshjúnini verða ímillum gestirnar. Men Jóannes Eidesgaard varð noyddur at geva avboð.

– Eg noyddust tíverri at geva avboð, tí eg hhelt, at tað politiska arbeiðið í Føroyum kravdi, at eg varð verandi heima, sigur hann.

Hann sigur, at skuldi hann farið, hevði tað mesta av trimum døgum farið til ferðina og tað føldi hann ikki, at hann hevði stundir til, sum umstøðurnar nú eru.

Eitt nú er tað kreppustøðan í Suðuroy sum upptekur Løgmann so nógv, at hann helt, at hann kundi ikki fara av landinum.

Samgongan arbeiðir hart fyri at finna eina loysn á trupulleikanum hjá Suðuroynni. Samstundis eru onnur politisk mál á skránni, nú løgtingið kemur saman aftur og tá helt løgmaður ikki, at hann kundi fara til Keypmannahavnar.

Hann fegnast tó um, at tað bar til hjá Edmundi Joensen, løgtingsformanni at vera við, so almennu Føroyar vóru umboðaðar.